Tíðindabrævið
Hugin&Munin
Granskingarverkætlanin fyri Økismenning

Nr. 4 2001 2. árg.

# Bókaútgáva 18. februar

Tann 18. februar er ein merkisdagur fyri Granskingardepilin fyri Økismenning. Hetta er dagurin, tá ið fyrsta bók okkara, „The Restructuration of the Faroese Economy“, kemur út. Bókin verður givin út av forlagnum Samfundslitteratur í Danmark.

Bókin er eitt úrslit av eini granskingarverkætlan um vinnulívsmenning í Føroyum eftir búskaparkreppuna. Hendan verkætlan varð gjøgnumførd seinna hálvár 2000 og í byrjanini av 2001. Verkætlanin varð skipað við fýra sokallaðum case-studium av útvaldum støðum í Føroyum. Hesi vóru: Klaksvík, Fuglafjørður, Tvøroyri og Vágur. Harumframt er ein sjálvstøðugur partur um menningina av føroysku alivinnuni.

Bókin vísir, hvussu íverksetarar, myndugleikar og feløg virka fyri nýskapan í føroyska búskapinum, ein menning, sum í stóran mun hevur røtur í lokalum viðurskiftum. Hendan hugsan verður undirbygd við bæði søguligum og nútíðar atliti; serliga er tað tann fjøltáttan, sum er hend í føroyskum vinnulívi seinastu árini, ið er eitt áhugavert fyribrigdi. Eisini minnir bókin í sínum søguliga tilfari á, at tey støð, sum í einum tíðarskeiði eru útjaðari, kunnu í einum øðrum skeiði vera drívmegin.

Bókin, ið er gjørd við altjóða útgávu fyri eyga, er skrivað á enskum, og verður til keyps í bókasølunum kring landið.

Í løtuni verður arbeit við einari føroyskari útgávu av bókini. Ætlandi kemur føroyska bókin út um ársskiftið.




*Umslagi á bókini „The Restructuration of the Faroese Economy“*



Grannastevna

Kaspar Lytthans
www.nora.fo, www.northernperiphery.net

# NORA – en alsidig brobygger

Der kan siges mange vise ord om de mange frodige resultater, der fødes ud af kontakten og af forskellen mellem mennesker, fag, lande, virkeligheder osv. De vise erfaringer er som regel ganske rigtige, og i NORA siger vi dem tit og ofte, både til os selv og til hvem der lægger øre til.

**Det er nemlig vores ledestjerne.**

Samvær og udveksling mellem lande er nu ikke noget nyt, men det gør det ikke mindre relevant. Til gengæld er det blevet et kerneelement i store dele af den udvikling, der i dag foregår i det meste af verden. Der er ikke blot tale om den generelle tendens til at fusionere selskaber, til at sprede sine økonomiske aktiviteter ud over mange lande. Der er tale om den målrettede organisering af regional samarbejde.

Det nordlige Atlanterhav er en region. Det var den allerede for over tusind år siden, da vikinger fra mange egne skabte en mere eller mindre entydig kultur i hele det nordatlantiske område. Og det er den stadig, trods nationsdannelser og globalisering. Der er mange ting, der binder regionen sammen, fiskeriet som hovederhverv, mentalitet, sprog, fælles værdier samt bosættelsen i de mange små samfund for bare at nævne nogle.

Det var også de ensartede erhvervs- og levevilkår, de fælles udfordringer og interesser, der for 20 år siden i 1981 blev motivationen for etableringen af et nordisk finansieret projektsamarbejde mellem Færøerne og Østisland. Dette samarbejde, der i 1983 inddrog Grønland og i 1996 udvidedes med Nord- og Vestnorge hed frem til 1996 Vestnordensamarbejdet. Siden 1996 er navnet NORA, Nordisk Atlantsamarbejde.

Som navnet antyder, er samarbejdet stadig nordisk, og det er i dag en ud af 7 nordiske såkaldte grænseregionale projektsamarbejder, der tilsammen modtager ca. 15. mio. kr. i tilskud fra Nordisk Ministerråd. Men hvor de øvrige 6 er målrettet mod fælles problemstillinger i mindre områder, der er delt af nationale grænser, er NORA forskellig herfra ved at være et samarbejde mellem to selvstyreområder, et helt land og et halvt land. Færøerne, Grønland, Island og det halve Norge.

Dette giver nogle særlige muligheder, men det giver også nogle særlige udfordringer. I mange år er disse søgt løst gennem medfinansiering af snesevis af projekter inden for hovederhvervene fiskeri, industriudvikling, transport, turisme, landbrug osv. Virksomheder, privatpersoner, forskningsinstitutioner og myndigheder har trukket linjer over havet og gennemført forsøg, analyser, udveksling af erfaringer og teknologisk udvikling med mange gode resultater til følge.

Måske er Vestnordensamarbejdet og NORAs resultater ikke alle lige kendte, men de er der, og de er mange. Som nogle få eksempler på gode projekter kan nævnes etableringen af det vestnordiske turismesamarbejde med det tilhørende Travel Mart, anvendelsen af telemedicin i sundhedsvæsnet, bl.a. til skibe, kvalitetsudvikling af lammeproduktion, udvikling af teknologi til fileteringsmaskiner og netværkssamarbejde mellem fiskeriuddannelser. Et projekt, der for nylig har været meget omtalt i den færøske presse, er udviklingen af marine biprodukter i et samarbejde mellem færøske og norske virksomheder.

Et sådant samarbejde har på mange måder været forud for sin tid. Det er nemlig grundlæggende den samme idé, der i dag er fundamentet for en gigantisk grænseregional indsats overalt i EU, og det er også det, der igennem de senere år har udviklet sig til at være en vigtig ledetråd i erhvervsudvikling overalt på kloden. Denne udvikling har skabt et perspektiv, der giver NORA nøglen til kunne opnå en særlig position i Nordatlanten.

**NORAs nye opgaver**

NORA har i konsekvens af denne udvikling omlagt sin strategi til en mere offensiv orientering, til at være mere proaktiv, for at sige det med et modeudtryk. Det betyder kort og godt, at NORA i højere grad selv skal tage initiativer til at få trukket opgaver og problemstillinger frem, der er fælles for de fire lande og for regionen, og som med fordel kan løses gennem en fælles indsats.

Samtidig understreges i strategien, at NORAs arbejde især skal komme erhvervsudviklingen i de fire lande til gode. Ikke at det kun skal omfatte erhvervslivet selv - samarbejde mellem virksomheder, myndigheder og forsknings- og udviklingsinstitutioner fremhæves som særligt interessant. Men kort sagt er det erhvervslivets muligheder for gennem innovation at bidrage til økonomiske fremgang, der opfattes som omdrejningspunktet i det nordatlantiske fællesskab, NORA arbejder for.

NORAs vision i dette arbejde er at være formidler eller katalysator for etableringen af netværk mellem udviklings- og innovationsprocesser i de fire lande. Hensigten er, at de nationale udviklingsmiljøer vil kunne opnå en væsentlig større effekt både indadtil og i forhold til andre og større lande og markeder ved at udnytte den fælles kompetence i regionen. NORAs arbejde er således ikke begrænset til bestemte erhvervssektorer, men kan gå ind, hvor der er opgaver at løfte. Udviklingen af opgaverne skal ske i nær dialog med både virksomheder, myndigheder, organisationer, forskningsinstitutioner og andre aktører i regionen.

For at starte denne nye proces op afholdt NORA en stor konference i november 2001 på Færøerne. Her var der præsenteret tre temaer inden for marin produktion, transportforhold og erhvervsudvikling i forbindelse med internationale megainvesteringer som olieproduktion o.l. Under konferencen udarbejdede workshops med centrale beslutningstagere i regionen forslag til en fælles indsats inden for de tre temaer.

*Framhald á síðu 4*

# Drevdagen vil ráða sær sjálvum

Í Dalarna leni í Vestur-Svøríki liggur bygdin Drevdagen. Har búgva umleið 150 íbúgvar, og teir hava í langa tíð stríðst ímóti skógarfyritøkum og lokalu myndugleikunum. Í 18. øld tók svenski staturin ræði á skóginum har um leiðir á ein hátt, sum bygdarfólkið heldur vera lítið sømiligan. Rættindini hjá teimum sum brúkara av skóginum eru síðani tá vorðin alt meiri skerd. Í dag er støðan tann, at bygdarfólkið hevur ikki so frægt sum loyvi til at fáa sær brenni í skóginum, hóast tey búgva mitt í honum.

Drevdagen er kendur av flestum svium sum bygdin, hvørs íbúgvar stríddust manniliga fyri at varðveita bygdarskúlan. Drevdagen-íbúgvarnir vunnu seks ára langa stríðið í 1989 eftir beiskt stríð við lokalu myndugleikarnar, og íbúgvarnir eru kendir sum fólkið, ið ikki vil lata bygdina avtofta. Í flestu svensku útjaðarabygdum minkar fólkatalið. Øðrvísi við Drevdagen, har fólkatalið veksur, og miðalaldurin har er niðanfyri 40.

Sigurin í skúlastríðnum hevur stimbrað menningarætlaninar hjá bygdafólkinum. Ein áhugafelagsskapur er stovnaður við tí endamálið at fevna um tey mongu sjálvbodnu feløgunum í bygdini og at tosa sum ein rødd vegna bygdina. Náttúruferðavinna er ein partur av menningarætlanunum eins og smávinna grundað á vistfrøðiliga burðardygt skógarvirksemi. Ferðavinnuparturin umfatar t.d. kamping, kanorógving og gongutúrar, men eisini hundasledutúrar og ríðing á hestbaki.

Lokal fyrisiting av skógartilfeinginum er partur av menningarætlanunum, og hettar verður roknað sum eitt týðandi amboð til tess at gera hinar ætlaninar til veruleika. Skógartilfeingið, sum talan er um, er í tveimum. Ein partur er tað náttúrutilfeingið, ið verður umsitið av lensstýrinum. Hin partin av tilfeinginum eigur ein statslig fyritøka, nevnd Sveaskog. Meðan parturin, ið lensstýrið umsitur, inniheldur stór lívfrøðilig og mentannarlig virði, tá ið tað kemur til varðveiting, so er parturin hjá Sveaskog at kalla trátroyttur uttan kortini at geva fyritøkuni nakran nevniverdan vinning.

Bygdarfólkið heldur, at tey eru betur før fyri enn bæði lenstýrið og Sveaskog at umsita tilfeingið í skóginum. Millum grundgevingarnar er, at tey hava staðbundnu vitanina um skógartilfeingið, og eftirsum tey liva í skóginum, so hava tey ongan áhuga í at beina fyri skóginum, men heldur at varðveita hann, soleiðis at hann kann gagnnýtast burðardygt í allari framtíð. Hugsan bygdarfólksins er, at staturin framvegis skal eiga skógarlendið, men at bygdarfólkið sjálvt umsitur skógartilfeingið.



*Partur av bygdini Drevdagen, sæddur úr luftini*

Tá ið Drevdagen-búgvar av fyrstan tíð vendu sær til lenstýrið og Sveaskog og skutu upp, at bygdarfólkið sjálvt átti at umsitið skógin, so møttu tey mótstøðu og tortrúni. Eftir at partarnir hava samskift og mýkt hugskotini í áravís, so eru báðir partar farnir undir eitt meiri samstarvandi samskifti, har smá stig verða tikin til tess at gera dreymin hjá bygdarfólkinum til veruleika.

Samstarv hevur verið ein týðandi partur av arbeiðnum hjá Drevdagen-fólkinum. Áhugafelagið í bygdini hevur verið í samband við mangar aktørar. Ein av teimum, sum hevur veitt eina dugnandi hond, hevur verið svenska universitetið fyri landbúnaðarvísindi, ið hevur givið bygdini nýggj hugskot og nýggjar samstarvsfelagar. Saman við øðrum bygdum, sum eisini arbeiða fyri lokalari fyrisiting av náttúrutilfeinginum, hava tey stovnað samstarvsfelagsskapin PANic (People and Nature in Cahoots).

Óvæntað hjálp er komin bygdini til góðar í sambandi við skógarmálið, tí fýra familjur eru komnar til bygdina, ið hava ætlanir um hundasleding. Tá ið hesar familjurnar komu, høvdu tær longu handilssambond innan hundasleding, og saman við øðrum í bygdini leggja tey nú til rættis, hvussu Drevdagen kann verða sett á kortið, sum tikið verður til, millum teirra, sum hava áhuga í hundasleding. Hettar virksemið hevur givið menningarætlanunum í bygdini nakað meiri ítøkiligt yvir sær og eisini samstundis skundað undir tær.

Hvørt ætlaninar hjá bygdarfólkinum fara at eydnast ella ikki, valdast bygdarfólkið sjálvt. Tað tykist vera sera umráðandi at fáa alla bygdina við í menningarætlaninar. Fyri at fremja eitt uppskot um varandi burðardygga økismenning er umráðandi, at øll hava eina kenslu av, at tey hava eitt orð at siga. Annað, sum hevur týdning, er at sannføra lensstýrið og Sveaskog um, at bygdarfólkið hevur førleikan og vitanina at fyrisita skógartilfeingið, eins og tað er umráðandi, at øll ivamál viðvíkjandi hvussu tilfeingið skal brúkast, eru lýst til fulnar. Samansetingin av nýskapandi menningarætlanum, samstarvi á øllum stigum og myndanini av einum lokalt og globalt grundaðum samleika, kann føra til eina bjarta framtíð fyri Drevdagen. Seinast, men ikki minst, so kundi ein væl eydnað umsiting av skógartilfeinginum opna møguleikar fyri mong onnur bygdarsamfeløg í Svøríki og kanska aðrastaðni í Norðanlondum við.

*Per Sonnvik*



*Kavaskotarar verða nógv nýttir, bæði til arbeiðis og frítíðarítriv*

# Framtíðin kemur av sær sjálvari - menning má skapast

Uttan fyri Ålesund liggja oyggjarnar Valderøya, Godøya, Vigra og Giske. Á einari teirra, Vigra, er eisini høvuðsflogvøllurin í økinum. Fyri fimtan árum síðani mátti siglast út á oyggjarnar, men seinast í áttatiárunum vórðu tær samanbundnar við undirsjóvartunlum. Hettar broytti samskiftið við meginøkið almikið, tí fólk sluppu nú til og frá, nær tað skuldi vera.

Kommunurnar settu sum vera man stórar vónir til framtíðarmenningina av oyggjunum. Fasta sambandið fór at geva tí virksemi, sum longu var, rúmari ræsur, og eisini varð roknað við, at fyritøkur í Ålesunds-økinum yvirhøvir fóru at leita til bíligaru grundøkini uttan fyri stórbýin.

Veruleikin gjørdist kortini ein heilt annar. Roknað varð við, at menningin fór at koma av sær sjálvum við fasta sambandinum, og nóg nógv var ikki gjørt fyri at fáa fult burtur úr nýggjamøguleikanum. Tá ið so fasta sambandið eisini fekk álvarsligar fíggjarligar trupulleikar at dragast við, so varpaðu fjølmiðlaumrøðan eitt so negativt ljós á øki, at áhugin hjá fyritøkum og øðrum minkaði burtur í einki.

Í høvuðsheitum hendi tað, at fleiri og fleiri fingu høvi til at arbeiða í Ålesund. Tá ið so einki veruligt varð gjørt hiðani, ja so vaks einvegis ferðslan bara. Ålesund vaks um talið av parkeringsplássum og bussambandið mátti betrast, alt til frama fyri oyggja-búgvarnar, ið arbeiddu inni í Ålesund.

Tað gjørdist alt meiri greitt, at oyggjarnar máttu taka stig til eina eginmenning. Eitt samstarv millum vinnulívið og vinnulívsdeildina hjá Giske Kommune førdi til, at kommunan í 1998 vendi sær til býarætlanarfyritøkuna Gillespies í Glasgow.

- Gløgt er gestsins eygað, verður sagt. Og vit vildu gjarna hava eygu uttaneftir at fortelja okkum, hvørjir menningarmøguleikar eru í økinum, sigur Henrik Vang, ráðgevi í vinnumálum í Giske Kommune.

Verkætlanin kallast „Gateway to Sunnmøre“, og heitið sipar til flogvøllin í Vigra í Giske Kommune. Sjónarmiðið er, at kommunan eigur at fáa væl meira burturúr hesum ferðsludepli. Gillespies hevur havt norska arkitektin Torstein Lervik sum millummann, og eftir fundir við umboð fyri kommunu, vinnulív, feløg o.s.frv. hevur Gillespies gjørt stóra frágreiðing við uppskoti um, hvussu skotska fyritøkan heldur, at Giske kommuna eigur at leggja til rættis, so trivnaðurin og virkisføri fella í pløging og kommunan eisini gerst lokkandi at seta seg niður í, bæði hjá fyritøkum og einstaklingum.



*Vigra við Gjøsund. Á Vigra er eisini ‚portrið‘ til Ålesund og økið har. Verkætlanin „Gateway to Sunnmøre“ hjá skotsku fyritøkuni Gillespie greiðir m.a. frá, hvussu hetta kann vera við til at stimbra menningini í kommununi sum heild*

Sí eisini:

www.giske.kommune.no

---

*NORA - en alsidig brobygger*

Resultatet er således en række opgaver for de kommende år, som deltagerne selv har defineret og hvor de allerede har en grundstamme i et netværk, der kan gennemføre det.

Konferencen var en succes, og er én af flere eksempler på NORAs arbejdsmetode i de kommende år. I tillæg hertil vil NORA kunne medfinansiere projekter, der udspringer af dette og andre samarbejder.

**Nordlige Periferi Program**

NORAs vision om at kunne bidrage til netværkssamarbejde i Nordatlanten er samtidig blevet styrket gennem etableringen af et større EU samarbejdsprogram, Nordlige Periferi Program. Programmet omfatter det nordlige Finland, Sverige, Norge og Skotland samt Færøerne og Grønland. Island ventes at indgå i nær fremtid. Med i alt 200 mio. over seks år i programfinansiering skal der her etableres samarbejdsprojekter inden for områderne transport og IT, ressourceudnyttelse og virksomhedsudvikling samt lokalsamfundsudvikling. Målet er i høj grad at styrke udviklingen i de mindre og ressourcesvage samfund i hele denne region.

NORA udgør et regionalt sekretariat i programmet og vil på vegne af Færøerne og Grønland (og måske også Island) håndtere udviklingen af kontakter og projekter. En sådan rolle vil samtidig give NORA en central funktion i forhold til de vestnordiske landes opbygning af relationer til EU.

Med disse redskaber til rådighed satser NORA i de kommende år på at kunne efterleve den urgamle erfaring om udvikling gennem samarbejde og erfaringsudveksling.

Útgevari:
**Granskingarverkætlanin fyri Økismenning**
Jústagøta 1
**Postadressa:**
Postboks 159
700 Klaksvík
Tlf. 457744 & Fax 457743
Suðuroy: Tlf. 37 44 77
E-postur: region@region.fo
Heimasíða: www.region.fo
**Ábyrgd:** Dennis Holm og Bjarni Mortensen
**Umbróting:**
Miðil, Klaksvík
**Prent:**
Hestprent